# Arbeiði við bókmentum

Her er dømi um ein frymil, sum tú kanst brúka, tá ið tú arbeiðir við bókmentum. Greitt verður frá hugtøkunum *inn í tekstin, inni í tekstinum og út úr tekstinum*.




Tá ið tit fara **INN Í TEKSTIN**, skulu tit sansa, kenna, undrast og liva tykkum inn í huglagið.

Tá ið tit arbeiða **INNI Í TEKSTINUM**, skulu tit fara á veiðuferð eins og detektivar og greina slóðir, sum teksturin sipar til. Okkurt stendur beinleiðis í tekstinum, meðan týdningurin av onkrum øðrum er at finna ímillum reglurnar.

Tá ið tit fara **ÚT ÚR TEKSTINUM**, skulu tit taka saman um týdningin í eini tulking. Tit skulu skifta orð um hetta og seta tað í samband við tykkum sjálv og tann heim, tit eru partur av.



Nem í sætta síða 148